HØVUÐSSTUÐUL

BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968



# STØKK

## 2026 / 2027



# *Góði fimleikari og foreldur*

*Nú fara vit aftur undir eitt nýtt fimleikaár við góðum treysti.*

*Hetta er fimleikaár nr. 60 hjá felagnum. Støkk verður 60 ár hin 23. novembur, og føðingardagurin verður fagnaður stóran part av novembur mánaða við framsýningum, veitslum og øðrum spennandi tiltøkum.*

*Tað eru sera nógv, sum gjøgnum ár og dag hava íðkað fimleik hjá okkum. Tað eru vit í felagnum sera stolt av.*

*Vit vilja, at tú sum fimleikari skal kenna teg væl í felagnum, og vit gleða okkum til eitt spennandi og hendingaríkt fimleikaár.*

*Vit fara at ynskja tær eitt gott fimleikaár.*

*Heilsan*
*Nevndin*

## Ein fimleikari

- Møtir væl upp
- Møtir altíð til tíðina
- Venur í fimleikaklæðum
- Lurtar eftir venjaranum
- Hevur heilsugóðan mat við til venjing



## Góð ráð

Tað er sera týdningarmikið, at fimleikarar fara væl um Bylgjuna.

Tí er týdningarmikið at:
- lata seg úr skónum í gongini
- fimleikarar bara eru í amboðum, tá ið venjarin er til staðar

Børn, sum hava serligar avbjóðingar, mugu hava ein hjálpara við til venjing.

## Støkkbúnin:

Støkkbúnin kann bíleggjast fyri tilboðsprís í Intersport frá 29. august til 29. sept. 2026

## Heiðursmerki og nálir

Heiðursmerki og nálir verða givin frá 1. flokki

**Ídnismerki**: verður givið til tann fimleikara, ið hevur verið íðin, aktað væl og møtt væl upp.

**Bronsunál**: verður givin til tann persónin, ið hevur verið virkin í felagnum í 5 ár.

**Silvurnál**: verður givin til tann persónin, ið hevur verið virkin í felagnum í 10 ár.

**Gullnál**: verður givin til tann persónin, ið hevur verið virkin í felagnum í 15 ár.

# Støkk fyllir 60 ár

Tann 23. novembur eru 60 ár liðin síðan Fimleikafelagið Støkk varð sett á stovn. 60 ára føðingardagin fer felagið at hátíðarhalda við fleiri ymiskum tiltøkum í november 2026. Meira verður at frætta á stokk.fo, tá ið føðingardagurin nærkast.

# Felagsliðið

Fimta árið á rað hava vit eitt felagslið fyri allar fimleikarar, venjarar og samskiparar hjá Støkk frá 12 ár og uppeftir. Hetta liðið hevur sera góða undirtøku við umleið 60 fimleikarum, og tískil fara vit aftur at bjóða hendan møguleikan fram. Venjingartíðir hjá Felagsliðnum koma seinni. Meira verður at frætta á stokk.fo.

# Klubmodul

Allir íðkarar skulu melda til á stokk.klubmodul.fo áðrenn fyrstu venjing. Til ber at fáa endurgoldið limagjaldið, um íðkari gevst og boðar frá á stokk@stokk.fo áðrenn heystfrítíðina.

Gjaldingarskipanin Klubmodul verður brúkt sum grundarlag undir øllum virkseminum hjá Støkk.

Týdningarmikil boð verða send umvegis Klubmodul til limirnar, protokol yvir liðið verður gjørd á skipanini og skuldi ein fimleikari komið til skaða í einum fimleikatíma, má hesin verða skrásettur í skipanini fyri at fáa tryggingargjald.

Tí er sera týdningarmikið at gjalda limagjaldið áðrenn fyrsta fimleikatíma.



# Nevndin

**Rannvá Troest,**
forkvinna, tel. 289193

**Dagbjørt Sólheim,**
næstforkvinna, tel. 280906

**Ingvar Hansen,**
peningarøkil, tel. 288472

**Mia Rodmundardóttir,**
skrivari, tel. 237295

**Katrin Thomassen,**
nevndarlimur, tel. 219701

**Bodil H. Heimustovu,**
eykalimur

**Oddur Mohr Jakobsen,**
eykalimur

# Samskiparar

| | |
|---|---|
| **Børn undir skúlaaldur og onnur breiddarlið:** | Rakul tel. 266032 |
| **Dreingir 1.–10. fl.:** | Anna tel. 592027 |
| **Gentur 1.–10. fl.:** | Eyð tel. 267008 og Ann Mari tel. 229203 |
| **Estetiskt kappingarlið:** | Mary tel. 221018 og Diana tel. 276711 |
| **Amboð kappingarlið:** | Elisabeth tel. 270161 og Heidi tel. 263967 |
| **Klubmodul, tilmelding og gjalding:** | Arnfríð, John og Kirstin. Eru ivamál, send boð til Støkk á Facebook |

**FIMLEIKAFELAGIÐ STØKK**
stokk@stokk.fo **www.stokk.fo**
www.facebook.com/fimleikafelagidstokk
www.instagram.com/fimleikafelagidstokk

**TILMELDING:**
**Tú meldar teg til á**
**www.stokk.klubmodul.fo**



**HØVUÐSSTUÐUL**
BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

**UNDIRSTUÐLAR**
NAVIGARE
HOLM BYGGING

**KLÆÐNASTUÐUL**
INTERSPORT

estra VÁSTI

## KALENDARI

Heystfrí 12. – 18. okt. 2026. Breiddarfimleikurin hevur frí
Jólafrí 14. des. 2026 – 3. jan 2027. Breiddarfimleikurin hevur frí

## FIMLEIKAFRAMSÝNING

Árligu fimleikaframsýningarnar eru 13. – 14. mars 2027

**Estetiskar kappingar**
Fyrsta steypakapping í Bylgjuni í Runavík 23. jan. 2027
Onnur steypakapping í Badmintonhøllini í Klaksvík 20. febr. 2027
Triðja steypakapping í Høllini á Hálsi í Tórshavn 20. mars 2027
Undankapping til FM við Tjarnir í Tórshavn 15. mai 2027
FM finalan við Tjarnir í Tórshavn 16. mai 2027

**Amboðskappingar**
Liðkapping í Bylgjuni í Runavík 7. – 8. nov. 2026
Steypakapping í Fimi í Tórshavn 6. – 7. febr. 2027
Smákapping í Fimi í Tórshavn 17. apríl 2027
FM í amboð í Bylgjuni í Runavík 8. – 9. mai 2027

